Góðu næmingar og foreldur :-)

Mikudagin 12. juni fara vit til Eiðis á seturskúla. Vit búgva í húsinum í Hólmanum, ið liggur beint við vøllin.

Næmingarnir møta í skúlanum mikumorgunin kl. 8.40 - bussurin koyrir kl. 9.00.

Vit eru aftur fríggjadagin uml. kl.11.30.

Ætlanin er at ganga upp á Slættaratind, møguliga upp á Eiðiskoll, og annars at spæla, sparka, fiska, vassa og mangt annað. :-)

Næmingarnir fara eisini at royna seg sum kokkar bæði miku- og hóskvøldið, tá vit fara at gera grýturætt og pasta annan dagin og karrybollar og rís hin dagin.

– Somuleiðis standa næmingarnir eisini fyri uppvaski og upptøku annars.

Um eitthvørt er, kunnu tit hitta okkum á : 280315 (Sigrid), 280382 (Birna), 280319 (Ása) og 280348 (Guðrun).

At hava við:

- heit klæði (so sum ullintar hosur og troyggju)
- regnklæði
- 2 sett av klæðum
- sólkrem um neyðugt ☺
- 'toiletgreiðir' og handklæði
- undirlag ella madrassu, ið fyllir lítið (ikki luftmadrassu – tær larma ov illa)
- soviposa/dýnu, kodda og lak
- ryggsekk við góðum, stórum matpakka og onkrum at drekka (til túrin upp á Slættaratind)
- gonguskógvar til túrarnar og einar eyka skógvar
- 100 kr í lummapeningi (í mesta lagi)
- sminku (um tú skalt sminka dreingjunum)
- tað, ið stendur á listanum niðanfyri

Stuttligt hevði verið, um næmingarnir tóku spøl við – t.d. ymisk borðspøl, kort og hoppibond.

Seturskúlin kostar 200 kr. fyri hvønn. Peningurin kann latast lærarunum fríggjadagin 7. juni ella í seinasta lagi týsdagin 11. juni.

Á listanum niðanfyri síggja tit, hvat tykkara barn skal hava við.

Vit gleða okkum til hugnaliga samveru ☺

Vinaliga

Ása, Guðrun, Birna og Sigrid

## At hava við:

2 pk súrepladjús ($1\frac{1}{2}$ litur):
Jógvan Andreas, Páll, Natan, Pætur og Petur

1 stóra skuffukøku:
David, Ragnhild, Tummas, Eva og Jón

1 kg bollar:
Kaj, Baldur, Kára, Búi, Oddvá, Alma Bjørk, Ró, Jóhan, Maria L., Tóri og Marna.

1 kg grovbollar:
Karin

Glutenfríar bollar til 3 næmingar (tveir dagar)
Knud

1 stóran Kærgården:
Róar og Andrass

1 stóran ost:
Ingi, Brandur, Astrid, Bartal Páll og Saloma

1 spann av jarðberja súltutoy
Jákup

1 dupultan pk av páleggsjokulátu:
Jónas S., Djóni, Julia D., Julia J. og Páll Fríði

Smyrjisjokuláta:
Maria H., Andrias, Bartal og Jógvan Jákup

1 Nøtti:
Rógvi, Sóley, William og Guðrun

Glutenfríar karrybollar:
Halla